




## Hálvársroknskapurin 2004

*í 1.000 kr.*

| Rakstrarroknskapur 1. hálvár | 2004 | 2003 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur o.a. | 147.643 | 159.315 |
| Rentuútreiðslur o.a. | 28.978 | 34.621 |
| **Rentuinntøkur netto** | **118.665** | **124.694** |
| Vinningsbýti av partabrøvum og øðrum kapitalpørtum | 329 | 265 |
| Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 8.572 | 10.586 |
| Útreiðslur til kostnað og provisiónir | 121 | 82 |
| **Rentu- og kostnaðarinntøkur netto** | **127.444** | **135.463** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | -4.109 | 1.752 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 267 | 15.645 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **123.602** | **152.860** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 63.242 | 60.902 |
| Avskrivingar av óítøkiligum og ítøkiligum ognum | 2.725 | 1.624 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 79 |
| Tap og burturleggingar fyri skuldarar (netto) | 19.290 | 116.793 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 2.903 | -2.434 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **41.248** | **-28.972** |
| Skattur | 8.257 | -5.700 |
| **Hálvársúrslit** | **32.991** | **-23.272** |

| Fíggjarstøða pr. ultimo juni | | |
|---|---|---|
| **Ogn:** | | |
| Kassapeningur og áogn í lánistovnum o.a. | 268.669 | 221.873 |
| Útlán | 3.517.740 | 3.315.609 |
| Láns-, partabrøv o.a. | 1.468.778 | 1.597.057 |
| Kapitalpartar í leysknýttum og tilknýttum feløgum | 127.884 | 116.577 |
| Ítøkiligar ognir | 65.300 | 65.318 |
| Aðrar ognir og tíðaravmarkingar | 35.952 | 44.140 |
| **Ogn tilsamans** | **5.484.324** | **5.360.575** |
| **Skuld:** | | |
| Skuld til lánistovnar | 87.956 | 63.363 |
| Innlán | 3.802.796 | 3.792.749 |
| Onnur skuld og tíðaravmarkingar | 45.996 | 30.436 |
| Avsetingar til skyldur | 4.475 | 5.171 |
| Úrslit higartil í ár | 32.991 | -23.272 |
| Eginpeningur | 1.510.111 | 1.492.127 |
| **Skuld tilsamans** | **5.484.324** | **5.360.575** |
| Ábyrgdir | 143.989 | 149.718 |
| Aðrar skyldur | 30.000 | 62.086 |
| **Tøl, sum ikki eru tikin við í javnan, tilsamans** | **173.989** | **211.804** |

FØROYA BANKI


# Útvarpið og sjónvarpið leggjast saman

**Frá 1. januar komandi verða Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya ein og sami stovni. Hesa avgerð kunngjørdi Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum fríggjamorgunin**



*Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður hevur gjørt av, at Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya skulu verða ein og sami stovnur*

SAMANLEGGING
*Tíðindaskriv*

Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur gjørt av at leggja Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya saman í ein stovn frá 1. januar 2005.

Endamálið við samanleggingini er at rationalisera raksturin hjá stovnunum mest møguligt, so tað besta útvarps- og sjónvarpstilboðið kann fáast burturúr tøku fíggjarorkuni hjá stovnunum. Eisini er endamálið við samanleggingini at stovnarnir skula gerast betur førir fyri at røkja sínar public service-uppgávur. Landsstýrismaðurin metir, at rætta løtan til at fremja samanleggingina er nú, orsakað av at Sjónvarp Føroya stendur fyri at fremja innanhýsis bygnaðarbroytingar. Ein samanlegging má sjálvandi gerast, áðrenn hesar broytingar verða framdar.

Landsstýrismaðurin heldur, at tað eru nógvar góðar grundir, ið tala fyri samanlegging. Ein samanlegging av stovnunum við felags leiðslu kann tryggja, at umsitingin verður betri og meira effektiv. Her verður hugsað um at:

- umsitingarútreiðslur kunnu avmarkast við at leggja umsitingarligar funktiónir saman
- stovnarnir sleppa undan hvør í sínum lagi at menna og reka virkisøki, sum eru tey somu á báðum stovnunum (t.d. KT, bandasøvn, innkrevjing, bókhald, o.a.)
- møguleikarnir verða betri at gagnnýta orku og servitan, ið eru til staðar á ymsum virkisøkjum
- møguleikarnir fyri at samskipa programmvirksemið verða betri
- umstøðurnar fyri at arbeiða tvørmedialt við útvarpi, sjónvarpi og netvarpi gerast rúmari
- betra møguleikar fyri starvsfólkamenning og starvsfólkarøkt
- stovnarnir verða umsitingarliga sterkari og hava møguleika fyri at røkja uppgávur, sum teir ikki hava møguleika fyri hvør í sínum lagi

Sostatt fáa vit ein sterkan almennan public service stovn, ið tó av givnum grundum eigur at hava tvey sjálvstøðug og óheft redaktiónsumhvørvi.

Landsstýrismaðurin fer í næstum at leggja uppskot um broyting í kringvarpslógini fyri Løgtingið, ið skal geva heimild at leggja stovnarnar saman. Eisini fer landsstýrismaðurin í næstum at seta ein arbeiðsbólk við breiðari umboðan at gera uppskot til eina heilt nýggja føroyska kringvarpslóggávu.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, hevur í morgun kunnað stjórarnar í ávíkavist Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya um hesa ætlan, og hevur landsstýrismaðurin í hesum sambandi heitt á stjórarnar um at kunna starvsfólkini á stovnunum um samanleggingarætlanina.

At enda skal verða víst á, at ein skipan við útvarpi og sjónvarpi í einum og sama stovni er ein vanlig skipan í okkara grannalondum, t.d. RUV í Íslandi, DR í Danmark, NRK í Noregi og BBC í Bretlandi.

Landsstýrismaðurin er sannførdur um, at vit eftir samanleggingina fara at fáa eitt betri útvarp eins væl og sjónvarp.

# Løgmaður á stevnu í Slesvig

MENTANARSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og frú Anita fóru hósdagin til Slesvig at taka lut í setanini av norðurlendskari ró- og mentanarstevnu. Stevnan varð sett i í gjár, fríggjadagin kl 15.00 av Hansara Kongaliga Hátign Joachim prinsi.

Stevnan er sprottin úr fyrstu stevnu av hesum slag, sum varð hildin á Tvøroyri í 2002.

Á stevnuni í Slesvig verður 1200 ára minningarhald hildið fyri Hedeby, sum var ein tann størsti og mest týðandi handilsstaður í víkingatíðini.

Norðurlendska ró- og mentanarstevnan í Slesvig verður í døgunum 5. til 9. august.

# Pláss er eftir í Svøríki, Danmark, Noreg og Stóra Bretlandi

ÚTBÚGVING
*Tíðindaksriv*

Hóast allar freistir at søkja um upptøku eru farnar, so er ikki at fella í fátt um tú annaðhvørt ikki hevur søkt ella ikki slapp inn har sum tú ætlaði tær. Í Danmark, Noregi, Svøríki og Stóra Bretlandi ber til at leita eftir tøkum lestrarplássum, heimasíðurnar eru hesar

Danmark: www.kot.dk
Svøríki: www.studieplatser.nu
Noreg: restetorget
Stóra Bretland: www.ucas.com/clearing/index.html

Lesið annars meira um útbúgvingar á ask@ask.fo



# Jespersen skal standa fyri samanleggingini

**Landsstýrismaðurin heldur nógvar orsøkir tala fyri samanleggingini, og hann sigur seg hava samtykt í landsstýrinum aftanfyri seg**

SAMANLEGGIN AV ÚF/SVF
*Jóannes Hansen*



Jógvan Jespersen, stjóri í Útvarpi Føroya, skal hava ábyrgdina av samanleggingini av útvarpinum og sjónvarpinum, sum landsstýrismaðurin í mentamálum í gjár boðaði frá, at hann ætlar at gera. Um Jógvan Jespersen eisini skal vera superstjóri fyri nýggja samanlagda stovninum, tá ið samanleggingin er vorðin veruleiki á nýggjárinum, sigur Jógvan á Lakjuni seg í løtuni ikki duga at siga nakað um.

Greitt er, at starvið sum sjónvarpsstjóri verður niðurlagt. Harvið tykist tað sum um, at Mikkjal Helmsdal ikki verður ábyrgdarmaður í Sjónvarpi Føroya, tá ið Jógvan Jespersen skal hava ábyrgdina.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann á landsstýrisfundi fyrr í vikuni hevði hetta málið fyri, og at landsstýrið samtykti at taka undir við ætlanini, sum skal gerast til veruleika frá 1. januar 2005.

- Ætlanin at leggja saman hevur fleiri ferðir verið frammi. Onkra ferðina er tað næstan vorðið til veruleika, men so er tað dottið niður fyri aftur. Tað eru so nógvar umstøður og viðurskifti, sum í løtuni tala fyri hesum, sigur Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri.

*Hvørjar?*

- Í SvF hevur verið tosað um bygnaðarbroytingar. Tað er ein orsøk. Yvirornað haldi eg, at tað hevur alstóran týdning at fáa ein sterkan public service stovn, sum kann røkja skyldur og ábyrgdir. Við samanleggingini rokni eg við, at vit fáa ein sterkari stovn, enn vit hava nú. Tað síggi eg eisini sum ein góðan møguleika at fáa ein sterkan stovn, sum verður betri førur fyri, enn teir báðir stovnarnir higartil hava verið, at standa ímóti ella at vera eitt betri alternativt tilboð til alt tað, sum kemur uttanífrá og inn yvir okkum.

### Lógarbroytingar

Jógvan á Lakjuni sigur, at tað verður neyðugt við broytingum í kringvarpslógini, og at hann so skjótt, sum tað fer at bera til, fer í tingið við uppskotum um broytingarnar. Tá ið hann hevur samgonguna aftanfyri seg í tí, sum hann hevur ætlanir um at fremja, heldur hann onga orsøk vera at ivast í, at lógarbroytingarnar fara at fáa undirtøku.

Jógvan á Lakjuni roknar við, at samanleggingin eitt nú fer at hava fíggjarligar, tøkniligar og journalistiskar fyri munir.

*Hvussu nógv roknar tú við, at tit fara at spara?*

- Tað havi eg ikki enn nøkur tøl fyri, men eg ivist ikki í, at vit í hvussu so er fara at fáa meiri fyri pengarnar, sum lurtarar og hyggjarar higartil hava goldið til stovnarnar.

*Átti tú ikki at havt roknað upp á hetta, áðrenn tú fert út við hesum?*

- Sum eg havi sagt, so haldi eg, at tað eru nógvar góðar grundir at leggja saman. Tíðin hevur verið knøpp, og tað er nógv eftir at gera, áðrenn hetta gerst til veruleika. Hetta er ein av spurningunum, sum vit fara at royna at fáa svar uppá.

*Hevur hetta stigið júst nú nakað við tað at gera, at SvF hevur havt ætlanir um at samsenda við DR?*

- Nei. Men eg rokni ikki við, at tað stigið fer at verða tikið nú.

# Tjóðveldið er við uppá tað

**Fyrrverandi landsstýrismaðurin í mentamálum heldur stigið hjá landsstýrismanninum vera skilagott, og hann roknar við, at Tjóðveldisflokkurin fer at vera positivur**

SAMANLEGGING ÚF/SVF
*Jóannes Hansen*

Tá ið Sosialurin segði Tórbirni Jacobsen, næstformanni í tingbólki Tjóðveldisfloksins, at landsstýrismaðurin hevur sent tíðindaskriv út um, at hann ætlar at leggja ÚF og SvF saman, hevði hann ikki frammanundan hoyrt hetta grett.

- Tí úttali eg meg egna vegna og ikki fyri flokkin. Høgni Hoydal, formaður í flokkinum, er burturstaddur, og vit hava sjálvsagt ikki havt stundir at tosa um og viðgera hetta málið. Men eingin ivi skal vera um, at eg eri positivur yvirfyri tankanum, og eg veit, at flokkurin fer at viðgera hetta málið positivt, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Harvið tykist greitt, at tað í prinsippinum fer at verða rættuliga breið semja í Løgtinginum um ætlanina hjá landsstýrismanninum í mentamálum um lógarbroytingarnar, sum tað verður neyðugt at fremja fyri at leggja ÚF og SvF saman í ein stovn.

Tórbjørn Jacobsen er samdur við landsstýrismanninum í, at talan ivaleyst fer at verða um stovn, sum verður betri førur fyri at røkja public service uppgávur, og at talan verður um stovn, sum tað almenna eisini fer at kunna rokna við fer at røkja neyðugar uppgávur.

- Tað merktist væl á ÚF, tá ið SvF sá dagsins ljós. Kappingin gjørdist størri á fleiri økjum,og dygdin gjørdist betri. Síðani hava stovnarnir ment seg rættuliga ymiskt. ÚF er har, og tað røkir sína uppgávu. Kring SvF hevur turbolensurin verið stórur, og soleiðis sum støðan nú er vorðin, so haldi eg ikki, at tað bilar nakað, at SvF fer at hvørva sum sjálvstøðugur stovnur. Eg rokni ikki við, at vit fara at kenna tað aftur í, at tað, sum verður at síggja á skíggjanum, verður verri, og at tað verður minni av føroyskum tilfari, enn tað higartil hevur verið. Heldur vóni eg, at leiðslan fyri samanlagda stovninum saman við starvsfólkunum fer at verða før fyri at venda gongdini.

### Ringt orð á seg

Tórbjørn Jacobsen, sum er framsøgumaður hjá størsta andstøðuflokkinum í mentamálum, sigur seg halda, at signalini frá SvF seinastu tíðina ikki hava styrkt um umdømið hjá stovninum millum fólk.

- Eg haldi, at skipanin er sjúk. Teir bóðu um meiri pengar, og vit hækkaðu hyggjaragjaldið rættuliga nógv. Síðani hava vit hoyrt, at teir rokna við, at teir kunnu framleiða færri føroyskar sjónvarpstímar. Tá ið vit kunnu vænta okkum minni sjónvarp fyri fleiri pengar, so haldi eg, at okkurt er spinnandi galið. Tí er tað rætt av landsstýrismanninum at taka um rótina á hesum, og tað haldi eg, at hann hevur gjørt, nú hann sigur seg ætla at leggja ÚF og SvF saman í ein stovn. Eg eri fyri hesum. Vit í Tjóðveldisflokkinum hava ikki viðgjørt málið, men eg vænti avgjørt, at vit fara at vera positivir, sigur framsøgumaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum í mentamálum, Tórbjørn Jacobsen.



Lesið meira á síðu 7


